# <nýtt - nýtt>

# 3arin <nýtt - nýtt>

## now 3



**bólkar:** T.A.T.U, Nik & Jay, Ingrid, Robbie Williams, Sugababes, Pink, Eminem, Westlife o.o.
**skeringar:** 19
**plátufelag:** now music

## roxette



**heiti:** the pop hits
**skeringar:** 15
**plátufelag:** capitol records

## celine dion



**heiti:** one heart
**skeringar:** 14
**plátufelag:** columbia records

## linkin park



**heiti:** meteora
**skeringar:** 13
**plátufelag:** warner bros records

## mr deeds



**høvuðsleiklutir:** adam sandler og winona ryder
**longd:** 93 minuttir
**prod. ár:** 2002

Longfellow Deeds er ein elskuligur, fittur og bláoygdur drongur, sum livir ein heilt vanligt lív, sum eigari av einasta pizzastaðnum í býnum. Men ein dag fær Deeds at vita, at hann hevur arvað 40 milliónir dollarar. Tá Deeds flytir til Manhattan fyri at fáa sítt nýggja arbeiði í fjølmiðlafyritøkuni, sum fylgdi við í arvinum, broytir hann fullkomiliga uppá tingini og ger arbeiðsplássið um til eitt »klemmiøki«. Men tað eru fólk, sum eru úti eftir honum, og skjótt má hann prógvað, at sjálvt um pengar broyta alt, so broyta teir ikki øll...

## 8 mile



**høvuðsleiklutir:** eminem, kim basinger, brittany murphy og mekhi phifer
**longd:** 111 minuttir
**prod. ár:** 2003
**OBS!** Region 1

Fyri Jimmy Smith, Jr. er lívið ein dagligur bardagi bara fyri at halda vónini uppi. Á pallinum í Detroit fær hann sínar tónleikadreymir uppfyltar, og Jimmy fer ígjøgnum eitt persónligt stríð fyri at finna sína egnu rødd og eitt pláss í heiminum, har tónleikurin ræður, legendur verða føddar og hvør løta er ein nýggjur møguleiki.

## ali g indahouse



**høvuðsleiklutur:** sacha baron cohen
**longd:** 83 minuttir
**prod. ár:** 2003

Hann hevur verið sjafførur fyri Madonnu, rappað við Shaggy. Nú hevur tú høvi at uppliva tann bretska komikaran og superstjørnuna, sum tú ongantíð hevur sæð hann fyrr í hesum kontroversiella skemtifilminum.

## cm4 - championship manager 4



heimsins best umtókta fótbóltsspæl nakrantíð er aftur. við 39 altjóða fótbóltsdeildum og yvir 200.000 spælarum og hjálparfólkum hevur tú allan fótbóltsheimin við tínar føtur. Flytingar, taktikkur, venjing, venjarar og dystir. Tað er onki annað manegaraspæl, sum er so fullkomið. Við tí heilt nýggju 2D vísingini kanst sú síggja júst hvar tín taktikkur eydnaðist og hvar hann miseydnaðist.






## Robbie Williams fleiri tatoveringar



Robbie Williams hevur aldrin roynt at liva eftir krøvunum hjá øðrum. So tá hann fær hug at koyra ein túr inn í tey ljótu kvarterini í Los Angeles fyri at drekka og fáa tatoveringar – líka sum í teimum góðu, gomlu døgunum, áðrenn hann bleiv multi millionerur – ja, so ger hann tað bara.

Robbie fór eitt kvøldi saman við vinum til ein tatovør Shamrock Tattoo, sum liggur slongt millum vápnahandlar og stripklubbar á tí skitnu síðuni av Sunset Boulevard í filmbýnum.

Tað tók nakrar tímar, so kundi Robbie vælnøgdur hyggja at sínum hálsi, har hann tað varð tatoverað: Chacun à son gout við rúna skrift. Tað merkir nakað sum: Eg geri sum tað passar mær. Og tað má sigast at passa til tann freka sangarin, sum altíð gongur sínar egnu leiðir.

## Claire Danes forelskað



Í filminum "It´s all about love" spælir Claire Danes ein ung skoytuprinsessa, sum livir í eini verð, sum frystir til ís.

Men í løtuni letur til, at kuldi og ísur eru nakað, sum liggja langt burtur frá í hugaheiminum hjá Claire Danes. Sjónleikarakvinnan og sjeikurin hjá henni, tann avstralski sangarin, Ben Lee, njóta nevniliga tað heita summarið.

Tað er onki at ivast í, at tey bæði eru forelskaði enn, hóast sambandið teirra millum nú hevur vart í meira enn fimm ár. Tað varð lagt upp til kærleika teirra millum, tá Ben sang ein kærleikssang fyri Claire, tá hon fylti 18 ár.

## Aftur kaos í lívinum hjá Juliu Roberts



Julia Roberts, 35 ár, hevði kent tað á sær í eina tíð, men tá hon skrykti hurðina til ein av umklæðingartrailarunum upp og fann mannin hjá sær, Danny Moder, í ørmunum á tí 20 ára gomlu Kirsten Dunst gekk hon amok. Hon fleyg upp undir loftið yvir, at maðurin hjá sær lat seg forføra av eini aðrari kvinnu, enn henni, sum stendur á vígslubrævinum.

Tað er tó ironiskt, tí tað var á júst sama hátt, at Julia av fyrstan tíð fekk fatur á manni sínum, sum tá var giftur við Vera Moder.

Tilburðurin henda dagin í umklæðingartrailaranum endaði tó við, at Kirsten Dunst, sum arbeiðir saman við Juliu til upptøkurnar til filmin Mona Lisa Smile, vissaði Juliu um, at onki hendi millum tey bæði.

Men vinir hjá parinum siga, at tað skal ikki nógv til afturat, so flytir Julia Roberts frá manni sínum. Men tað vildi verið ein sera óheppin støða, tí parið hevur tosað nógv um at fáa børn, og søgur vilja vera við, at Julia Roberts longu er við barn.

Sostatt letur ikki til, at Julia Roberts er í ferð við at fáa stýr upp á sítt lív enn.

## J-Lo nýggjan partnara



Jennifer Lopez hevur funnið sær ein nýggjan partnara, men hann er avmarkaður til venjingarhølini. Talan er um gamla musklakongin Sylvester Stallone, sum framyvir skal hjálpa Jennifer at venja.

Jennifer og Stallone lata til at koma væl útav tí, og tey trívast saman. Sly, sum hann ofta varð kallaður, fegnast eisini óivað um sín nýggja vin at venja saman við.

Jennifer Lopez hevur verið meira ella minni besett av at venja í longri tíð nú, og hon heldur ikki, at nakar kundi verið betur at vant saman við enn Sylvester Stallone.

## Kylie tosar opið um gamlan sjeik




Kylie Minoque er rasandi ill, tí fyrrverandi sjeikur hennara, James Gooding, hevur selt sína síðu av søguni um sambandið teirra millum til eitt bretskt blað. So nú hevur hon tikið hevnd og er farin at tosa, hóast hon í fyrsta umfari hevði ætlanir um at tiga.

– í byrjanini var eg púra vekk í James. Eg var so forelskað, men so byrjaði tað at ganga galið. Hann klárar ikki at liva uttan at sniffa kokain ella drekka, sigur Kylie sambært Sunday People.

## Leysatíðindi:

**Liz Hurley** fer ikki at mangla pening fyribils. Hon hevur júst skrivað undir ein modellsáttmála áljóðandi 40 milliónir krónur við Estee Lauder

**Russell Crowe** fer at giftast við unnustu sínari, Danielle Spencer, tann 7. apríl. Sama dag, sum hann fyllir 39 ár. Brúdleypið verður eitt av teimum minnu við "einans" 80 gestum.

**Kate Winslet** og hennara tvey ára gamla dóttir, Mia, vóru herfyri umborð á einum flogfari, sum mátti neyðlenda. Orsøk: Starvsfólkið óttaðist, at tað møguliga vóru yvirgangsmenn umborð

**Meg Ryan** heldur, at mannfólk er alt ov nemm.
– Tað einasta, sum skal til er, smyrsl, langar negl og ein forførandi rødd, sigur hon. Og hon skuldi vita, hvat hon tosar um, tí líka síðani hon og Dennis Quaid vórðu sundurlisin, hevur hon so at siga ikki gjørt annað enn at royna eftir mannfólki.

– Eg plagdi at hata at gera meg so nógv til, áðrenn eg skuldi út, men eg havi funnið út av, at ein kann koma rættuliga langt við nøkrum fáum og einklum ráðum, sigur hon flennandi.

**Brad Pitt** er í kjallaranum fyri tíðina. Hjúnalagið við Jennifer Aniston hongur í einum klønum trá. Keldur vilja vera við, at parið hevur tosað álvarsamt um skilnað. Men tað letur tó til, at parið í fyrstu atløgu hevur gjørt av at geva tí ein møguleika afturat. Men í seinastuni hevur Brad Pitt sæð so keddur út, og tað boðar neyvan frá góðum.

**Slatursøgur** ganga heitar um, at Backstreet Boys hava ætlanir um at finna saman aftur. Tað ljóðar, at dreingirnir vilja grava fíggindaskapin niður og fara í upptøkuhølini at spæla eina fløgu inn síðst í hesum mánaðinum.

**Eminem** er ikki altíð tann sami…Rapparin hevur nevniliga ein, sum líkist sær so nógv, at hann nýtir hann sum "stand-in", um hann kennir seg hóttan.

**Russel Crowe** er byrjaður at ganga til undirvísing í boksing. Endamálið er ein nýggjur leiklutur í einum filmi, men man hann ikki eisini kunna brúka okkurt av tí, sum hann lærir har privat?

**David Hasselhoff** var herfyri við at koma heilt illa fyri. Saman við konu síni bleiv hann tveittur av motorsúkkluni. Men bæði sluppu tó við smærri snuddum.

**Valentine´s Day** gav Britney Spears øllum sínum vinum, sum hon vanliga fylgist við eina bróstpiercing. Men hon vildi tó ikki hava eina sjálv

**Brad Pitt** er bangin fyri yvirgangsmonnum. Hann er so bangin, at hann hevur noktað blankt at luttaka í upptøkum, sum vóru tilrættislagdar í Marokko

**Lara Flynn Boyle** er fullkomuliga býtt, tá tað kemur til tøkni. Hon hevur havt ein DVD spælara standandi í fleiri mánaðirnar, sum henni ikki hevur eydnast at fáa at virka

**Jennifer Lopez** fekk herfyri yvirtalað ein biograf í London at tveita allar kvinnurnar út úr damu-wc-inum, tí frúan vildi ikki pissa, meðan onnur vóru í sama rúmi

**Christina Aguilera** hevur trupulleikar við tí eina bróstinum eftir at ein nærgangandi persórnur, sum hon dansaði við kom til at bíta hana so hart, at blóðið fleyt frá piercingina

**Onkur** hevur stolið fartelefonina hjá Eminem. Trupulleikin er ikki telefonin, men øll telefon nummurni hjá nógvum kendum fólkum, sum hann hevði goymt inni á telefonini

**Tom Cruise** hevur ikki bara stóra ávirkan í Hollywood. Eisini í Ný Sælandi hoopa og leypa tey á leistum fyri manninum. Hann hevur frábiðið sær alla flúgving oman fyri húsinum, sum hann leigar á oynni, meðan hann arbeiðir við upptøkunum til filmin The Last Samurai. Og tískil hava ný sælandsku myndugleikarnir sett flúgviforboð millum klokkan átta á morgni og til níggju á kvøldi í øllum økinum. So nú hevur Tom Cruise okkurt tilfelags við Saddam Hussein, sum eisini hevur eina no fly-zonu.

**Matthew McConaughey** deilir sína íbúð við einum 80 ára gomlum spøkilsi.

– Eg síggi hana so at siga hvørt kvøld, kanska tí eg altíð gangi runt nakin heima….Kanska hann átti at vita, um tað ikki er hansara gamla grannakona, sum ikki hevur ein eykalykil.

**Harrison Ford** heldur sær væl. Hóast hann er 60 ár, so er hann framvegis ein flottur maður. Loynidómurin er, sigur hann, nógv vatn, svart kaffi og einar 200 búkvenjingar um dagin.

## topp.10/dvd

01. XXX
02. Bourne Identity
03. Mr. Deeds
04. Ali G. – Indahouse
05. Vejen til perdition
06. Dragejægerne
07. About a Boy
08. Signs
09. Elsker dig for evigt
10. John Q

## topp.10/cd rom

01. Championship Manager 4
02. Splinter Cell
03. C&C Generals
04. Delta Force
05. Sims - Unleashed
06. Warcraft III
07. Empire Earth – Gold Edition
08. FIFA Football 2003
09. Project I.G.I. 2
10. Total Club Manager

## topp.10/ps2 spøl

01. Grand Theft Auto Vice City
02. Splinter Cell
03. Tekken 4
04. Ratchet & Clank
05. The Getaway
06. Lord of the Rings – the Two Towers
07. Crash Bandicoot
08. Pro Evolution Soccer 2
09. The Sims
10. Fireblade

## topp.10/fløgur

01. Ymiskt – Now 3
02. Linkin Park – Meteora
03. Ymiskt – Stjerne for en aften
04. Celine Dion – One Heart
05. Country Sisters – You Can Make Me Happy
06. Ymiskt – Absolute Love
07. Ymiskt – Absolute Romance
08. Ozzy Osbourne – The Essential
09. Ymiskt – Emotions
10. Brandur Enni – Brandur

3arin